# Fakfeløg í oljusamstarvi, hóast stevið ofta bilar

**Forkvinna Føroya Arbeiðarafelags ásannar í formansfrágreiðing síni, at ofta bilar stevið í samstarvinum millum fakfeløgini, men fegnast verður hinveg um, at stovnað er felagsskapur um oljusamstarv. Føroyingar ongan veg eru komnir enn á hesum øki, verður ásannað**

FAKFELØG
*Dagfinn Olsen*

Ingeborg Vinther ásannaði í formansfrágreiðing síni á aðalfundi í FA, at føroyska fakfelagsrørslan í ov lítlan mun hevur megnað at staðið saman. Í øllum førum er virði 7 mannabólkurin uppsteðgaður.

### Fekk myndugleikar at lurta

– Einki er at reypa av samstarvinum millum fakfeløg her á landi, tað má ásannast. Og við summi teirra er tað alt annað enn gott, sjálvt um FA var við til at seta 7–mannabólkin á stovn, nevniliga til tess at hava eitt fakfelagssamstarv og eitt forum, har tosað kundi verða um fakfelagsviðurskifti og trupulleikar, sum stinga seg upp millum fakfeløg, og at vit kundu loysa møguligar ósemjur og trupulleikar í hesum fakfelagsforumi. Hetta samstarv gekk væl alla ta fyrstu tíðina, og ofta fekk 7–mannabólkurin myndugleikarnar til at lurta og broyta støðu. Men tíverri er hetta samstarv mest sum steðgað upp, og byrjaði tað við, at ósemja kom í millum partar av feløgunum, eitt nú, tá ið annað felag fór inn um mark eftir limum úr øðrum felag.

Skal tí samstarv vera, má hetta byggja á álit og virðing millum feløg, og tað er júst har, ið tað bilar, stendur í formansfrágreiðingini hjá Føroya Arbeiðarafelag.

– Vit í FA fóru í góðum treysti í samstarv og royndu av øllum alvi at hava góðan samstarvsanda millum feløgini, men tíverri varð hetta gjørt til einkis, tá ið eitt annað felag fór so langt, at tað gjørdi avtalu upp á bakið á FA. Vit sóu avtaluna sum tíðindaskriv. Tað var við kommunalu arbeiðsgevarafeløgini, sigur Ingeborg Vinther í formansfrágreiðing síni, har hon samstundis fegnast um, at tað eru feløg, ið vilja samstarv, og metir hon vera neyðugt at standa saman.

### OSF

Samstarv innan olju er sett á stovn, verður fegnast um í formansfrágreiðingini hjá FA, men ásannað verður eisini, at enn er langt á mál á hesum økinum.

– FA er saman við Føroya Maskinmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag, og aftrat eru komin Landsfelag Handverkaranna og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Hesi 3 fyrstnevndu hava stovnað felagsskap, ið skal samstarva innan oljuvinnu og samráðast saman um sáttmála innan hesa vinnu. Hesin felagsskapur rópast Oljusamstarv Fakfelaganna (OSF).

Umboð fyri tey fyrstnevndu feløgini hava verið í Noregi á fundi við NOPEF og í Danmark við Dansk Metal at kunna seg um arbeiðs-og sáttmálaviðurskifti og heilsu-, umhvørvis-og trygdarviðurskifti. Sigast má, at vit í Føroyum eru onga leið komin. Eitt stórt arbeiði viðvíkjandi hesum liggur fyri framman hjá fakfeløgunum. Vit mugu royna at fáa okkara ráð og vitan frá teimum feløgum, ið hava verið í hesari vinnu í langt áramál. Vit fáa alla ta hjálp og vegleiðing, okkum tørvar, bæði frá NOPEF og Dansk Metal, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, m.a. í formansfrágreiðing síni.

# Pensjónsviðurskifti og tryggingar

**Tryggingarviðurskiftini virka ofta ov illa, hevur Ingeborg Vinther sagt í vikuni, eftir aðalfundin í FA. Føroya Arbeiðarafelag hevur víðkað donsku ALKA tryggingina. Á aðalfundi felagsins kom formansfrágreiðingin m.a. eisini inn á Als og inn á pensjónsviðurskifti**

FAKFELØG
*Dagfinn Olsen*

Nøkur viðurskifti, ið fylla nógv í formansfrágreiðingini hjá forkvinnuni í FA, Ingeborg Vinther, eru tryggingarviðurskifti, pensjónsviðurskifti og ALS skipanin.

FA hevur havt samstarv við ALKA og hetta samstarv verður nú víðkað.

– ALKA-tryggingin hevur virkað væl higartil, og er ætlanin, at vit víðka hana til at fata um barnatrygging fyri álvarsligar sjúkur og eingangstryggingargjald til teirra, ið vera 67 ár, og ikki koma undir eftirlønina, stendur í formansfrágreiðingini.

Ingeborg Vinther sigur, at arbeitt verður við tryggingarviðurskiftunum, tí tað eru ov mong dømi um, at her ruggar ikki rætt og ov tungt er at fáast við hetta.

– T.d. vanlukkutrygging. Her virkar illa og tað fæst bert 80% av eini arbeiðaraløn. Arbeiðsgevarin skal hava fólkið tryggjað, men tó er trupult at koma ígjøgnum, tá á stendur og onkur fær skaða. Tá skal ein til at stríðast ímóti skipanini, sigur Ingeborg Vinther í viðmerking.

### Pensjónir

– Hvussu skal ein pensjónsskipan vera í framtíðini? Skulu vit byggja út verandi skipan ella hava eina arbeiðsmarknaðarliga eftirlønaruppsparingarskipan? Hetta eru nakrir av teimum spurningum, ið hava staðið fremst í orðaskiftinum í Føroyum. Leiðirnar tykjast at vera tvær, ein, sum byggir á fólkapensjón og samhaldsfasta, ella ein, sum byggir á lógarfesta eftirlønaruppsparing. Andstøðuflokkarnir tykjast at vilja velja ta fyrru leiðina, meðan Landsstýrið hevði ætlanir um at koma við uppskoti um lógarfesta eftirlønaruppsparing, ið skuldi kosta upp til 10% av lønini. Men tíbetur eydnaðist ikki at fáa semju í samgonguni um eitt uppskot at leggja fyri Løgtingið, tí tjóðveldisflokkurin vildi hava okkurt um samhaldsfesti við.

Uppskot varð lagt fyri Løgtingið av 4 tingmonnum, at loyvt skuldi verða fakfeløgunum at gera samhaldsfastan eftirlønargrunn.

Áleggjast skuldi landsstýrismanninum í vinnumálum at leggja uppskot fyri tingið. Hetta varð samtykt, men einki uppskot er komið fyri tingið enn, so á hesum sinni hendi einki í tí málinum, segði Ingeborg Vinther m.a. á aðalfundinum í FA.

### ALS

Parturin viðvíkjandi ALS fyllir nógv í formansfrágreiðingini frá aðalfundinum í FA. M.a. verður sagt:

– 1. august í ár eru 10 ár liðin, síðan ALS fór undir at veita arbeiðsleysum fíggjarligan stuðul. Eisini skuldi ALS virka fyri møguleikanum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og umsita arbeiðsávísingina.

...Eg havi ongantíð ivast í, at nógv betri hevði verið, at arbeiðsávísingin var úti á teimum lokalu økjunum. Nógv misnøgd er í dag millum limirnar í FA um ALS, og hvussu skipanin virkar. Tá ið ALS byrjaði í 1992, tók búskaparkreppan seg av álvara upp, og arbeiðsloysið vaks í stórum, so skipanin hevði mangan stórar trupulleikar við at fáa pening til útgjøldini. Tí koyrdi ALS eisini við stórum halli og mátti taka stórt lán til tess at vera ført fyri at gjalda arbeiðsloysisstuðul út.

Í 1993 var hallið 121 milliónir kr., og útgjaldið var 280 milj. Hetta kundi limagjaldið ikki svara. Men í 1996 kom vend í, og ALS fór at klára seg væl betur, tí búskaparstøðan gjørdi, at arbeiðsloysið minkaði í stórum. Tær góðu tíðirnar hava gjørt, at ognin hjá ALS er vaksin upp móti teimum 400 milj. krónunum.

…Tær góðu tíðirnar hava eisini gjørt, at møguleiki hevur verið at broyta inngjaldsprosentið, so hetta síðani 1998 er lækkað úr 2,25% til 1,25%. Fakfeløgini hava eisini mett, at nú er rúm fyri at hækka útgjaldið úr 70% av eini arbeiðaraløn til 80% .Hetta var semja um millum bæði almennu og privatu fakfeløgini, tí nú eru ráð til at hækka útgjaldsprosentið heldur enn at lække inngjaldið enn meira.

Umboðini fyri løntakarasíðuna í stýrinum hava lagt uppskot fyri ALS um at hækka útgjaldið upp til 80%. Málið hevur verið til viðgerðar á einum fundi, men einki er avgjørt enn,og frá arbeiðsgevarasíðuni kom sum væntað eitt mótuppskot, ið miðar eftir at stytta tíðina, ið til ber at vera í ALS, og at skerja skipanina, so hon verður tann sama sum frá byrjan. Men ætlanin var alla tíðina, soleiðis sum ráðini gjørdust, at betra um ALS, og tað eru góðir møguleikar fyri nú.

… Tá ið ringast leikaði á í krepputíðini, vildu politikararnir einki hava við ALS at gera, tí skulu teir halda seg frá skipanini nú, hon gevur yvirskot. Annars hava ætlanir verið frammi frá Fíggjarmálastýrinum um at seta ALS á fíggjarlógina, men hetta hevur stýrið mótmælt, tí um tað verður gjørt, er vandi fyri, at pengarnir verða nýttir til annað enn tey arbeiðsleysu.



*Tað eydnaðist so at enda at fáa karnesdagarnar burtur, møguliga tí, at politikararnir hava varnast, at løgtingsval stóð fyri durum. Og teir sjálvir høvdu fingið sær í posa og sekk – lønarhækking, tænastumannapensjón og 2.000 kr. skattafríar um mánaðin til frímerki, sigur Ingeborg Vinther m.a. í formansfrágreiðingini frá aðalfundinum í FA*

### Barsilsskipanin

Sum flest øll vita,so verður barsilskipanin umsitin av ALS, sjálvt um bæði fakfeløg og fakfelagsumboð í stýrinum vóru ímóti tí. ALS-skipanin skal taka sær av teimum arbeiðsleysu og ikki blanda aðra skipan uppí.

Vit søgdu beinanvegin her í FA, at tá ið útgjaldið skal vera so høgt, at tað kann koma upp í 35.000 kr. um mánaðin, heldur enn at tað var upp til 20.000 kr., segði tað seg sjálvt, at skipanin fór skjótt at gerast ov dýr, og pengar komu at tróta í grunninum, og so var eisini. Fleiri milliónir vantaðu í.

Nú verður so tosað um at leingja barsilsskipanina í upp til 1 ár. Alt gott um tað, men skal tað verða við útgjaldi, sum gongur heilt upp í 35.000 kr., verður tað ikki 0,25%, ið skal gjaldast inn, men fleiri ferðir tað. Ætlanin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum var eisini at skerja skipanina, so tað kom at raka tey tímaløntu, men tíbetur varð uppskotið tikið aftur, bæði tí at FA, andstøðan og partur av samgonguni mótmæltu. Tað 0,25 prosentið, ið ALS-gjaldið lækkaði í ár 2000, varð tikið sum inngjald í barsilsskipanina, so í veruleikanum var eingin lækking.

### Dagpeningaskipanin

1.juni í fjør kom so nýggja dagpeningalógin í gildi, har nakrir batar eru gjørdir. Ein nevnd, umboðandi dagpeningaskipanina,FAG og undirritaðu, arbeiddi við at gera uppskot til nýggja lóg. Hetta tók sína tíð, ikki minst, tí umboðini fyri arbeiðsmarknaðin hildu fast við, at dagpeningaskipanin skuldi gjalda karensdagarnar, meðan tey almennu umboðini hildu seg til, at arbeiðsgevararnir skuldu gjalda. Og sum tit vita, stóðst ikki so lítið rok av hesum karensdøgum.

Umboð fyri arbeiðarafeløgini vóru á fundi við Løgtingsins trivnaðarnevnd, og tað vóru vit eisini úr 7-mannabólkinum. Øll mæltu vit til at avtaka karensdagarnar, og at dagpeningaskipanin skuldi gjalda hetta, tí tann almenni arbeiðsgevarin rindaði jú fyri tann alment lønta. Tað er eingin trupulleiki við tí, men beinanvegin,tað er tann tímalønti, er søgan ein heilt onnur.

Vit fingu andstøðuna í part við okkum eisini,og hart leikaði á til at fáa karensdagarnar burtur. Tað eydnaðist so at enda, møguliga tí, at politikararnir hava varnast, at løgtingsval stóð fyri durum. Og teir sjálvir høvdu fingið sær í posa og sekk – lønarhækking, tænastumannapensjón og 2.000 kr. skattafríar um mánaðin til frímerki, og so ikki at unna teimum, ið koma undir sjúkradagpening, løn frá fyrsta degi. Nú ber til at fáa dagpening upp til 40 vikur ístaðin fyri 20.Eisini ber til nú at fáa sjúkradagpening, um barn ella hjúnafelagi gerast álvarsliga sjúk og tað av lækna verður mett at vera alneyðugt, at persónurin er um tann sjúka, stendur m.a. at lesa í formansfrágreiðingini hjá Ingeborg Vinther frá aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag farna vikuskiftið.

# ítróttur

Nr. 58 • leygardagur • 23. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hondbólturin um vikuskiftið

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 23.03 | 14.30 | Kyndil-VÍF |
| 23.03 | 15.00 | Stjørnan-VB |
| 25.03 | 18.30 | StÍF-Neistin |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 23.03 | 16.00 | Kyndil-VÍF |
| 25.03 | 20.00 | StÍF-Neistin |

# Stríðið er enn opið

**Hjá kvinnunum er framvegis stórur spenningur um, hvussu býti av silvur- og bronsumerkjunum verður**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*



*Dysturin í Vági millum VB og Stjørnuna kann í nógvar mátar gera av, hvussu býtið av heiðursmerkjum verður*

Vinnur Neistin, so fáa tær silvur, og vinnur VB, so fáa tær bronsuna. Tapa bæði VB og Neistin hinvegin, so fær Stjørnan silvur og Neistin bronsu, og seinasti møguleikin er, um VB vinnur og Neistin tapir. Tá fáa vágbingar bronsu meðan Neistin kortini fær silvur.

### Alt er opið

Møguleikarnir eru fleiri, nú seinasta umfarið í kvinnuhondbólti skal spælast. Upprunaliga vórðu allir dystirnir ásettir at verða leiktir leygardagin, men av givnum orsøkum eru dystirnir hjá Neistanum fluttir til mánakvøldið. Sjálvandi kann tað verða eitt sindur óheppið, at seinastu dystirnir ikki verða leiktir samstundis, men undir verandi umstøðum má hetta góðtakast.

Leygardagin spæla so VB og Stjørnan í Vági, og fyri bæði liðini ræður her um at bjarga sær heiðursmerki. Sum nevnt, so viðførir ein sigur til Stjørnuna, at tær halda lív í vónunum um silvurmerkini, meðan ein VB sigur hinvegin viðførir, at Stjørnan ikki fær nakað sum helst burturúr kappingarárinum, meðan VB fær bronsuna.

Annars spæla Kyndil og VÍF eisini leygardagin, og her er lítið at ivast í, at VÍF er risa favorittur. Ivaleyst vilja tær eisini vaska blettin frá seinasta vikuskifti av sær, og verður tað eitt topptendrað VÍF lið, sum fer á vøllin, so er ilt at ímynda sær, hvussu Kyndil skal geva teimum nakra sum helst mótstøðu.

Seinasti dysturin verður so mánakvøldið, tá Neistin vitjar á Skála. Tá kenna tær bláu longu fortreytirnar, og tað kann so vera bæði ein fyrimunur ella ein vansi. Vinnur Stjørnan í Vági, so liggur alt trýstið á Neistanum undan hesum dystinum, og so er spurningurin, um tær megna at koppa seinastu mótstøðuni. Hinvegin kann eisini vera, at Neistin einki hevur at hugsa um, tá dysturin skal spælast, og so er spurningurin, hvønn veg hesir báðir møguleikarnir kunnu ávirka avrikið.

# Bert gullið kann skifta

**Hjá monnunm er longu við vissu greitt, hvussu liðini frá trý til sjey liggja, men enn er oddasessurin ikki avgreiddur**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*



*Vinnur VÍF á arvafíggjandanum úr Kyndli, so eru teir meistarar, og so kann úrslitið millum StÍF og Neistan mánakvøldið vera tað sama*

Bæði oddaliðini í manshondbólti, VÍF og Neistin, eru á útivølli á seinasta leikdegi, og hjá báðum er ein sigur sjálvandi av avgerandi týdningi.

Fyrst og fremst er hetta galdandi hjá VÍF, sum við einum sigri á arvafíggindanum úr Kyndli kann avgera gullið til egnan fyrimun. Alt bendir eisini á, at hetta skal eydnast VÍF. Kyndil hevur ikki somu styrki, sum teir høvdu fyri fáum árum síðani, og í hinum landskappingardystunum í ár hevur eingin ivi verið.

Vestmenningar hava tó fleiri ferðir í ár havt tað sera trupult móti liðum, sum á pappírinum átti at verið veikari, og eitt skifti nú móti kappingarenda tóktust teir gulu at hava fingið gummiarmar, og um so er, so kann talan gerast um ein heilt spennandi endaspurt. Hinvegin vístu vestmenningar móti hoyvíkingum fyri viku síðani, at teir kanska eru um at finna rætta stevið aftur, og verðru lagið tað sama mánakvøldið, so er einki at ivast í, at gullið aftur í ár endar í Vestmanna.

Tað er tó lítið at ivast í, at skuldi tað hent, at vestmenningar snáva í Havn, so eru teir bláu úr Neistanum til reiðar at lofta bóltinum, tá teir spæla inni á Skála. Ikki tí. Hetta er kanska ein av torførastu útidystunum yvir høvur, og í grundspælinum misti Neistin eitt sera, sera týðandi stig í júst hesum dystinum.

Hinvegin hava strandingar ikki tað stóra at spæla fyri nú. Teir fáa bronsuna, líka mikið hvussu víkir og vendir. Fótbólturin er byrjaður, og har eru Skálamenn fyri fyrstu ferð partur av bestu mansdeildini, so nógv talar fyri, at teir kanska taka sær av løttum hesaferð. Hinvegin skalt tú ongan tíð kenna teg tryggan við strandingunum. Teir høvdu heldur einki at spæla fyri, tá teir longdu um spenningin við at vinna á VÍF, og kunnu teir nú eisini koppa einasta avbjóðaranum hjá VÍF, so hava teir í øllum førum sett eitt virðiligt punktum fyri kappingarárinum.